

# 7-talsstigin kemur í 2011

**Nýggi próvtalsstigin, tann sokallaði 7-talsstigin, sum skal avloysa verandi 13-tals stigan, verður settur í verk í Føroyum frá skúlaársbyrjan 2011**

SKÚLAVERK
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Á skúlaleiðarafundinum 22. januar kunnaði landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, um, at frá skúlaársbyrjan í 2011 verða nýggjar námsætlanir settar í verk í øllum lærugreinum frá 1. flokki í fólkaskúlanum til endan á vinnu- og miðnámsútbúgvingunum, og námsfrøðilig stevnumið verða ásett fyri dagstovnaøkið.

Í eini námsætlan verður ásett endamálið við lærugreinini, og hvørji mál og krøv verða sett á ymsu floksstigunum.

Námsætlanirnar koma at avloysa tær lesiætlanir, sum eru galdandi fyri fólka- og miðnámsskúlarnar, og sum í fleiri førum hava tørv á at verða dagførdar. Seinastu tvey árini hava fleiri enn 50 bólkar av virknum lærarum úr øllum skúlaverkinum arbeitt við at gera uppskot til nýggjar námsætlanir frá fyrsta flokki til miðnám.

Í september og oktober 2009 varð skipað fyri hoyringar- og kunningarfundum kring landið. Í fleiri førum er víst á, at tørvurin á nýggjum námsætlanum er stórur. Mentamálaráðið hevur sett eina ritstjórn at viðgera tilfarið, sum komið er frá skúlunum, og at ritstjórna teimum umleið 50 uppskotunum til nýggjar námsætlanir.

**Í ritstjórnini eru:**

- John Dalsgarð, ritstjóri
- Sólvá Jónsdóttir, lærugreinaráðgevi
- Mortan Zachariassen, formaður fyri námsætlanararbeiðið

Á skúlaleiðarafundinum 22 januar segði landsstýriskvinnan millum annað, at tað hevur stóran týdning at tryggja, at námsætlanirnar fáa eina gjølliga viðgerð, áðrenn tær verða settar í verk. Tí er tað skilabest at lata ritstjórnina fáa hetta árið til arbeiðið. Førleikamálini í námsætlanunum og nýggi próvtalsstigin fylgjast, og verða tí sett í verk samstundis í august 2011.

- Eg vil á henda hátt tryggja, at lærarar fáa stundir til at fyrireika seg væl til nýggju námsætlanirnar og próvtalsstigan, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í Mentamálum.




